gult cyan magenta svart

Tað verður ikki nokk at liva av

–Verða lemmatrolararnir koyrdir upp í fiskidagaskipanina, fara teir í besta føri at fáa 250 dagar í part, og tað er alt ov lítið til at teir kunnu klára seg

Nú sær ógvuliga svart út hjá lemmatrolarunum, tí nú er ætlanin at fáa teir upp í fiskidagaskipanina. Men skulu teir yvirliva, er tað neyðugt, at teir fáa nógv fleiri dagar enn ætlanin er í løtuni. Niels Pauli úr Hvalba er ein av teimum 15 trolarunum, sum tað nú er farið at rilla undir

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú sær svart út hjá teimum 15 lemmatrolarunum í føroyska fiskiflotanum.

Landsstýrið ætlar, at teir skulu upp í fiskidagaskipanina eins og restin av flotanum, sum fiskar undir Føroyum.

Men eftir uppskotinum, sum fyriliggur í løtuni, fara teir at fáa alt ov fáar fiskidagar til at teir kunnu yvirliva.

Tað er eitt gamalt ynski hjá fiskivinnuumsitingini í landsstýrinum, at lemmatrolararnir eisini koma upp í fiskidagaskipanina, men higartil er onki hent.

Men aftur í ár hevur fiskimálastýrið biðið Skipanarnevndina gera eitt uppskot um, hvussu teir stóru djúpvatnstrolararnir kunnu koma upp í skipanina.

Eftir uppskotinum hjá Skipanarnevndini, fáa lemmatrolararnir ikki meiri enn 1.278 dagar tilsamans á teimum innaru leiðunum.

Tað gevur ikki meiri enn 85 dagar í part.

Men fara teir útum, fáa teir tríggjar dagar uttanfyri, fyri hvønn dag teir annars kundu havt fiska innanfyri.

Sostatt kunnu djúpvatnstrolararnir fiska í mesta lagi einar 255 dagar, um teir brúka allar dagarnar á ytru leiðunum.

Sinnaðir at tosa

Hetta er ikki nógv mikið til, at trolararnir kunnu klára seg, tí vanliga eru teir minst 300 dagar í sjónum um árið, sigur Bogi Mortensen, sum er skrivari í felagnum hjá lemmatrolarunum.

Hann vísur eisini á, at tað ber ikki til at brúka allar dagarnar á ytru leiðunum.

–Fiskiskapurin djúpvatnstrolarunum er einaferð so, at teir mugu innum viðhvørt, eitt nú eftir upsa um næturnar.

– Harafturat er kongafiskurin so, at hann flytir seg nógv, alt eftir, hvussu hitin er í sjónum, so av og á mugu trolararnir inn um fyri yvirhøvur at kunna fiska kongafisk.

– Tí er tað avgjørt neyðugt, at trolararnir eisini fáa fiskidagar á innaru leiðunum, sigur Bogi Mortensen.

Hann sigur, at felagið hjá lemmatrolarunum nú fer at biðja fiskimálastýrið um fund, har teir vóna, at tað ber til hjá landsstýrismanninum sjálvum at vera við, so teir fáa greitt honum frá støðuni.

Hann sigur, at felagið fer eisini at leggja nøkur hugskot fyri fiskimálastýrið um, hvussu fiskiskapurin hjá lemmatrolarunum kann verða skipaður.

Hann vil ikki útgreinað, hvat teir hugsað um, fyrrenn tað er lagt fyri Fiskimálastýrið.

Men hann sigur, at teir eru sinnaðir til eitt positivt og sakligt kjak um at broyta viðurskiftini, men at tað verður gjørt upp á ein máta, sum ger, at bátarnir kunnu yirliva.

Trongist saman um

Bogi Mortensen heldur nevniliga, at lemmatrolararnir hava stóran, samfelagsbúskaparligan týdning.

–Støðan hjá hesum bátunum er tann, at teir kunnu fiska alt tað, sum hinir trolararnir kunnu fiska. Men hinir trolararnir kunnu ikki fiska tað, sum lemmatrolararnir kunnu.

– Sostatt eru lemmatrolararnir einasti møguleiki, vit yvirhøvur hava til at fiska fiskin, sum er á djúpum vatni, og tað hevði verið eitt samfelagsligt bakkast ikki at fingið hann til høldar.

Ikki minst hava hesir trolararnir ovurhonds stóran týdning fyri Suðuroynna, har teir flestu av teimum eru skrásettir, og har at kalla øll fiskivinna á landi er lagað til hetta slagið av fiskiskapi.

– So ein og hvør minking av flotanum er eitt álvarsligt bakkast, ikki minst fyri Suðuroynna.

Men Bogi Mortensen sigur, at fáa trolararnir ikki fleiri dagar, enn uppskot nú eru um, verður tað ein álvarsamur trupulleiki, tí teir koma ikki at klára seg.

– Verður tað kortini sett í verk, er bara at staðfesta, at møguleikarnir hjá hesum skipunum eru versnaðir enn einaferð.

– Hesir trolararnir hava hvat eina umskiftiliga lagnu.

– Íøgustuðulin reyk. Og teir hava havt hjáveiðiprosent av toski og hýsu

– So fingu teir hjáveiðikvotu upp á 200 tons av toski og 200 tons av hýsu í part um árið og tað var ein nøktandi skipan.

– Men hendan kvotan varð brádliga skorin niður í helvt og tað hevur verið ein stórur trupulleiki, tí tað hevur ført við sær, at trolararnir hava verið noyddur at rýma undan rokfiskiskapi eftir upsa av tí, at ov nógvur toskur hevur verið uppi í.

– Hetta hevur darvað rakstrinum øgiliga nógv og tað var eitt sindur hugstoytt at verða skorin 50% í einum høggi.

– Og nú heldur fiskimálastýrið enntá, at hendan hjáveiðikvotan uppá 100 tons av tosk og 100 tons av hýsu um árið, er ov høg, so tað er trupult at vita, hvat tað endar við.

Bogi Mortensen minnir eisini á, at allur hesin niðurskurðurin hendur, samstundis sum rakstrarútreiðslurnar eru avbera høgar, tí oljan er blivin so dýr.

– Og samstundis eru trolararnir útihystir nógva staðni har teir plagdu at fiska, tí leiðirnar eru avbyrgdar av gørnum.

Eitt endamál hjá fiskimálastýrinum við at fáa lemmatrolararnar upp í fiskidagaskipanina, er hesin flotin hevur ikki lagað seg til tilfeingið undir Føroyum?

– Tað haldi eg ikki er rætt, tí hyggja vit eftir, hvussu nógv, teir ymsu skipabólkarnir eru minkaðir í prosentum, standa lemmatrolarnir neyvan langt aftanfyri aðrar bólkar.

– Eg haldi eisini, at tað er ógvuliga umráðandi, at vit varðveita hendan flotan, fyri at fáa fiska tað, sum er á djúpum vatni, sigur Bogi Mortenssen.

Sandoyingar nógv skerdir

ÁKI BERTHOLDSEN

Í allan august mánaða mugu sandoyingar lata sær lynda, at ferðasambandið til miðstaðarøkið verður munandi skert.

Tá skulu ábøtur gerast á ferjuleguna á Gomlurætt so at nýggja sandoyarferjan fær lagt at har.

Ímeðan hesar ábøtur verða gjørdar, ber ikki til at brúka Gomlurætt so hesa tíðina fer Tróndur at sigla ímillum Skopun og Havnina, akkurát sum í gomlum døgum.

Roknað verður við, at arbeiðið varar einar 3-4 vikur og ætlanin er at byrja nú um mánaðarskiftið.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hetta fer at ávirka sandoyarsiglingina nógv.

Tað er ein hálvur tími at sigla ímillum Skopun og Gomlurætt, men tað er tvær ferðir so leingi at sigla ímillum Havnina og Skopun.

–Sostatt fer tað neyvan at bera til at sigla meiri enn fimm ferðir ímillum í hesa tíðina.

Men av teimum túrunum, sum verða sigldir, verða onkrir farmatúrar burturav, tí tá ið Tróndur hevur treylarar við, hevur hann ikki loyvi at taka ferðafólk eisini.

Vanliga siglir Tróndur 11 ferðir ímillum Gomlurætt og Skopun um dagin, so ímeðan arbeitt verður upp á ferjuleguna, verður sandoyarsiglingin sostatt skorin meiri enn eina helvt.

Reidar Nónfjall sigur, at hann væntar, at tað serliga verða hósdagar og fríggjadagar, at fløskuhálsar verða, tí tá er fiskaflutningur á skránni.

Hann vónar tó, at tað fer at ganga og í løtuni er leiðslan á Strandferðsluni í ferð við at leggja ferðaætlan fyri Trónd hesa tíðina, arbeitt verður á Gomlu Rætt.

Hann sigur, at skuldi tað blivið heilt galið, eru onkrir møguleikar fyri at bøta um støðuna. Eitt nú ber tað til at lata Smyril leggja at á Sandi onkrar túrar á veg úr Suðuroy til Havnar, ella á veg suðuraftur.

Reidar Nónfjall sigur, at nýggja sandoyarferjan fer væntandi í sigling um árskiftið og tað verður ein rættilig kollvelting. Eitt nú tekur hon næstan tríggjar ferðir so nógvar bilar, sum Tróndur ger, og umstøðurnar hjá ferðafólki eru nógv betri.

Allan august mánað skulu ábøtur gerast á ferjuleguni á Gomlu Rætt og tað fer at ávirka ferðasambandi til og úr Sandoynni nógv, tí hesa tíðina skal Tróndur sigla til Havnar

gult cyan magenta svart

Føroya Banki bjó›ar av

Íløgumøguleikarnir hjá føroyingum er øktir nógv seinasta ári›, og nú bjó›ar Føroya Banki seg eisini fram í hesum sambandi

JÁKUP MØRK

Frá 1. mars at rokna, kom eitt n‡tt íkast til føroyska peningamarkna›in. Í litføgrum l‡singum bjó›a›i íløgubankin, Kaupthing, seg fram til áhuga›ar íleggjarar, og eftir øllum at døma, hevur hetta sett fer› á hugin hjá føroyingum at seta pening í láns- og partabrøv.

Í hvussu so er tykjast peningastovnarnir rokna vi›, at so er, tí nú er eisini Føroya Banki komin á markna›in í so máta.

Í donskum felag

Í mun til stigi› hjá Kaupthing, har eitt føroyskt partafelag var› sett á stovn, er ta› tó í samstarvi vi› danskt felag, at Føroya Banki nú bjó›ar seg fram.

Talan er um felagi›, BankInvest, sum er eitt íløgufelag, sum fleiri danskir peningastovnar, og altso ein føroyskur, eiga í felag.

Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, sigur vi› Sosialin, at talan sum so ikki er um naka› spildurn‡tt stig, sum bankin nú hevur tiki›: – Vit hava í eina tí› veri› vi› í BankInvest, men ta› er ikki fyrr enn nú, at samstarvi› er rættuliga formalisera›, grei›ir stjórin frá.

Hann sigur ví›ari, at ein hin størsta orsøkin til, at bankin nú er farin undir hetta stigi›, er, at vi› fallandi lánsbræavarentuni er ta› vi› tí›ini vor›i› alsamt minni lokkandi hjá privatfólkum at seta pening í eitt nú donsk lánsbrøv.

Rentan av hesum er nevnliga fult skattskyldug í Føroyum, og tá so rentan av innistandandi peningi eisini hækka, mótvegis lánsbrævarentuni, er ta› ein nátturlig avlei›ing, at áhugin fyri hesum fellur.

Betri møguleikar

– Hjá privat fólkum eru møguleikarnir fyri at seta pening í partabrøv rættuliga avmarka›ir, og tí hava hesi stórar fyrimunir av at vera vi› í einum íløgufelagi›, grei›ir Janus frá.

Tá er ta› nevnliga vi› eini stórari pulju, at fari› ver›ur út á markna›in, og vi› hjálp frá serkønum (íløgufelagi›), ver›ur so gjørt av, hvar pengarnir skulu plaserast. Størri peninganøgdin er, betri er møguleikin fyri at spja›a tilbo›ini, og ta› er júst í hesum, at fyrimunurin er vi› einum stórum íløgufelag, sigur bankastjórin. Hetta tí felagi› á tann hátt kann bjó›a vi›skiftafólkunum eina brei›a viftu av tænastum, har kundin so sjálvur er vi› til at gera av, hvussu samansetingin skal ver›a.

Sostatt kann ein velja, um talan skal vera um »tryggar« íløgur í eitt nú lánsbrøv, ella um man heldur vil vera naka› vágafúsur, solei›is at møguleikarnir eru fyri einum størri vinningi, men samstundis vi› størri tapsvanda.

Júst støddin á peninganøgdini heldur Janus Petersen annars vera stóra styrkin hjá BankInvest, og vísir hann á, at hetta er eitt av teimum íløgufeløgum í Danmark, sum hava størst umsetning.

Ta› er serliga hjá privatfólki, at talan er um fyrimunir, heldur Janus Petersen

Rá›geva eisini sjálvir

Sum nevnt, so er ta› serliga hjá privatfólki, at talan er um fyrimunir vi› einum íløgufelag. Skattalóggávan vi›førir, at talan ikki er um somu skattligu avmarkingar hjá virkjum, og harumframt kunnu virkini aloftast arbei›a vi› størri peninganøgdum enn privatpersónar.

Føroya Banki hevur eisini í nógv ár arbeitt vi› rá›geving hjá virkjum og størri privatum uppspararum, og hesum arbei›i heldur bankin eisini fram vi›, sigur stjórin.

– Samstarvi› vi› BankInvest er fyrst og fremst ein møguleiki, sum er ætla›ur »smærri« uppspararunum, og stjórin ivast ikki í, at hesi kunnu fáa fyrimunur av n‡ggja íløgumøguleikanum. Hann er tó minni avgjørdur, tá vit at enda spyrja, hvørjar fyrimunir teirra íløgufelag hevur fram um kappingarneytan á føroyska markna›inum:

– Ta› so vera naka›, sum íleggjararnir mugu mugu meta um. Talan er somu mekanismur, sum eru galdandi hjá bá›um feløgum, so kappingin hesum vi›víkjandi er á jøvnum føti, sigur Janus Petersen at enda.

Kapping er altí› vælkomin

Í Kaupthing bera tey ongan ótta fyri, at stigi› hjá Føroya Banka skal taka stø›i› undan teirra virksemi

JÁKUP MØRK

Eftir fáum mána›um hava føroyingar nú fingi› tveir n‡ggjar møguleikar, tá ta› ræ›ur um plasering av uppspardu peningamongdunum.

Fyrstur av hesum var Kaupthing, sum 1. mars fór undir sítt virksemi her á landi. Nú er so Føroya Banki eisini komin vi› í leikin, men hesum bera tey ongan ótta fyri í Kaupthing.

Var væntandi

– Nú hava vit veri› á markna›inum í f‡ra mána›ir, og vit høvdu alla tí›ina rokna vi›, at eitt mótspæl fór at koma. Eg vil heldur venda tí á høvdinum og siga, at vit høvdu veri› bilsin, um einki hev›i hent í so máta.

Or›ini eigur Jan Otto Holm, íløgustjóri hjá Kaupthing. Ví›ari sigur hann, at eftir hansara tykki er kapping altí› vælkomin: – Ta› plagar aloftast at vi›føra fyrimunir fyri allar partar, so eg síggi ongan trupulleika í hesum.

Uppspardu peninganøgdirnar í føroysku peningastovnunum eru somiki› stórar, at Jan Otto ongan ótta ber fyri, at føroyski markna›urin er ov lítil til tvey feløg av hesum slag.

Kapping plagar aloftast at vi›føra fyrimunir fyri allar partar, sigur Jan Otto Holm

Eru á sta›num

Spurdur, um ta› hevur givi› teimum nakran avgerandi fyrimun at vera fyrstir á markna›inum, sigur Jan Otto Holm, at ta› heldur hann ikki:

– Vit eru sjálvsagt fegin um, at vit solei›is hava veri› vi› til at opna dyrnar til íløgumarkna›in fyri vanliga føroyingin, men nakran avgerandi fyrimun haldi eg ikki man kann tosa um, sigur íløgustjórin hjá Kaupthing.

Hann heldur, at hetta vi› íløgufeløgum er somiki› n‡tt hjá vanliga føroyinginum, og tí eru ta› enn ikki tær heilt stóru peninganøgdirnar, sum eru sendar út á markna›in at nørast. Hinvegin heldur hann, at ta› í fyrsta umfari sn‡r seg mest um at grei›a frá, júst hvussu alt hetta virkar, solei›is at fólk kunnu kenna seg meira trygg í øllum hesum.

At enda leggur Jan Otto afturat, at teirra fyrimunur eftir hansara tykki er, at talan er um eitt føroyskt felag: – Vit eru eitt serstakt føroyskt felag, og selja okkara egnu produktir, eins og serkunnleiki okkara er her, og ikki í einum útlendskum felag.